# VIÐMERKINGAR

SAMBAND
EIRIKUR LINDENSKOV
EIRIKUR@SOSIALURIN.FO
TLF 341800

## Vekir stóran ans

Í gjár boðaðu 21 fakfeløg eftir felags fund frá, at tey ikki góðtaka, og at tey fordøma tann úrskurð hjá Fasta Gerðarættinum um, at heimilað stríðsstig skulu fráboðast við freist. Tey 21 feløgini meta úrskurðin vera gjørdan uttan heimild. Fakfeløgini siga, at tey á ongan hátt góðtaka, at vunnin rættindi og 100 ára gomul siðvenja verður rænd frá teimum, og at hesin úrskurðurin hevur skatt álitið á Fasata Gerðarættin. Tí fer fakfelagsrørslan alt fyri eitt at endurskoða avtaluna um Fasta Gerðarættin.

Útsøgnin hjá fakfeløgunum er markant, og hon skakar heilt víst arbeiðsgevarapartin. Í mong, mong ár hevur millum arbeiðsgevarar og arbeiðstakarar verið tosað og togast um, hvussu karmarnir um samráðingar og stríð skuldu skipast. Arbeiðsrættur var upp á tal, men hann gjørdist ongantíð veruleiki. Í staðin var Fasti Gerðarætturin settur á stovn. Hann er mannaður við umboðum, sum partarnir hava útnevnt og við óheftum formanni, sum rætturin er samdur um.

Í londunum kring okkum eru tað næstan hundrað ár síðan, at fastir karmar og mannagongdir vórðu fyriskrivað um, hvussu farast skuldi fram í sambandi við samráðingar og ósemjur. Høvuðsavtalurnar bera m. a. við sær, at báðir partar í góðari tíð eiga at kunna og verða kunnaðir um tað, tá ið stríðsstig ætlast at verða tikin, og mannagongdirnar í sambandi við seming og semingsfreistir eru fastar.

Fyri næstan hundrað árum síðani mettu grannalond okkara seg vera so mikið framkomin samfeløg, at partarnir á arbeiðsmarknaðinum í góðari tíð áttu rætt til at verða kunnaðir um verkfall og verkbann.

Í Føroyum hevur gingið striltið við at fáa hesi viðurskifti upp á pláss, og tað hevur fyri vanliga fólkið verið stórt forargilsi. Ikki minst tey sum búgva í útjaðaranum, og sum harvið hava verið meinast rakt, tá ið arbeiðssteðgir hava verið.

Nú boða fakfeløgini frá, at tey ætla at ganga frá aftur nýggju skipanini. Kravið vekir heilt víst stóran ans, og tað fer at bera stóran turbolens við sær, um avtalan um Fasta Gerðarættin skal endurskoðast. Fyri samfelagið og einstøku borgararnar er tað av alstórum týdningi, at hesi viðurskifti eru støðug. Tí mugu partarnir beinanvegin finna seg sjálvar og hvønn annan. Partarnir mugu seta seg saman aftur og hyggja at skipanini av nýggjum, um hon ikki virkar eftir ætlan. Skipanin er jú rættiliga nýggj og óroynd og tí má hon eisini náttúrliga evaluerast út frá gjørdu royndunum. Kritikkurin hjá fakfeløgunum má takast í størsta álvara. Hinvegin hevur samfelagið eisini krav uppá, at vit hava skipað viðurskifti.

**Sosialurin**

# Politisk metaltroyttheit í Tjóðveldi



**EDMUND JOENSEN**
løgtings- og fólkatingsmaður fyri Sambandsflokkin

**Fólkatingsmaðurin hjá Tjóðveldi, ið virkar sum stuðulsflokkur hjá Enhedslisten í Danmark, undrast á, at ein sambandsmaður ikki rekur fullveldispolitikk í Fólkatinginum**

Politiska metaltroyttheitin er av álvara farin at merkjast á Høgna Hoydal, fólkatingsmanni hjá Tjóðveldi.

Eitt ár fyri og annað eftir úti í politisku oyðimørkini kann slíta uppá sjálvt tann harðasta hálsin.

**Hví rekur Sambandið ikki fullveldispolitikk?**

Uttan úr oyðimørkini hoyrist stundum eitt ýl. Tað nýggjasta er, at Høgni Hoydal undrast á, at undirritaði ikki er ráðharri í Danmark og rekur fullveldispolitikk á Christiansborg.

Hann heldur, at fólkatingsmaðurin hjá Sambandsflokkinum eigur at brúka sín sess til at krevja stjórnina eftir samráðingum um fullveldi.

Álvaratos. Nú man standa illa til í Tjóðveldinum.

**Fullveldistrøini følnað**

Øll vita, at heimsmyndin hjá missiltum nationalistum í Føroyum er farin av lagi, eftir at íslendska fyrimyndin ikki longur kann brúkast sum prógv fyri, at fullveldistrøini vaksa heilt inn í himmalin.

Øll vita eisini, at tað pínir heilt inn á bein, at búskaparliga eksperimentið hjá Tjóðveldinum – at skerja blokkin og frysta hann – nú er um at taka grundarlagið undan vælferðini í Føroyum.

Men tað vardi meg kortini ikki, at misskiljingin røkkur heilt har til, at formaðurin í Tjóðveldi ímyndar sær, at fólkatingsmaðurin hjá Sambandsflokkinum skal fremja loysingina fyri hann, nú alt annað miseyðnaðist.

**Fornuftin vann**

Grundleggjandi orsøkin til, at máttloysið nú dagar so sjónskt undan, er, at politiska projektið, sum skuldi kollrenna Ríkisfelagsskapin, er farið fyri bakka.

Tað er nevniliga ikki gangandi eftir vegnum, sum Tjóðveldi og Høgni Hoydal uppfunnu undan løgtingsvalinum fyri 14 árum síðani og nevndu "skipað loysing".

Hesi 14 árini hava víst, at furnuftin vann. Føroyingar velja Ríkisfelagsskapin, samstarv og stabilitet fram um "skipaða loysing".

**Stuðulsflokkur hjá Enhedslisten**

Lat meg stutt minna á, at í Fólkatinginum hevur Tjóðveldi sum strategi at standa uttanfyri og rópa heldur enn at samstarva innanfyri.

Tað er ikki strategiin hjá Sambandsflokkinum. Vit samstarva við teir partar, ið reka skilagóðan politikk. Tað gevur ávirkan.

Fólkatingsmaðurin hjá Tjóðveldi er óførur at finnast at. Sjálvur man hann tó ikki hava nógv at vísa á eftir øll árini á Christiansborg.

Tí tað vita tey flestu: at vera stuðulsflokkur hjá Enhedslisten gevur eitt stað millum lítið og onki.

# Fær Slóðin slóðað fyri?



**BERGTÓRA H. JOENSEN**
Tjóðveldi

Meðan eitt álit er á veg, sum endurskoðar økið børn og ung, verða kollveltandi broytingar – onkur vil siga oyðileggingar - framdar á økinum. Vit minnast øll, marghátttliga framferðarháttin, tá Familjudeildin á barnaheiminum lat aftur:

Royndu starvsfólkini vóru uppsøgd, og eingin kundi siga, hvørji framtíðartilboð vóru væntandi. Starvsfólk, brúkarar og viðskiftafólk vóru ørkymlað. Øll væntaðu vit sjálvsagt, at hetta var eitt eindømi - men gakk! Nú eigur Slóðin tørn.

**Ótryggleikin heldur fram**

Avgjørt er, at Slóðin letur aftur. Ein nýggjur stovnur fer at lata upp, men eingin veit nær, hvar ella hvussu. Eini hús á Argjum hava verið nevnd, umframt Mjørkadalur. Rókin og Slóðin skuldu leggjast saman og kortini ikki!

Tað, brúkarir og starvsfólk vita er: At tey skulu vera úti úr leigaða húsinum hálvan februar, og starvsfólkini eru uppsøgd.

Felags fyri tey ungu á Slóðini er, at tey hava álvarsligar trupulleikar at dragast við og hava tørv á hollum stuðuli. Kann tað forsvarast, at seta júst hesi ungu, teirra avvarðandi og starvsfólkini í eina slíka støðu?

**Hvat sigur samgonguskjalið?**

Sambært samgonguskjalinum skulu umstøður skapast fyri, at børn og ung kunnu fáa nøktandi menningartilboð í Føroyum. Veruleikin er, at tey ungu skulu verða úti av Slóðini um 10 dagar, og ógreitt er, hvar tey skulu búgva, og hvør skal vera um tey. Hetta er beinleiðis skaðilig viðferð, ið elvir til ótryggleika, ótta og angist. Sjálvt hjá frískum vaksnum fólki er slík støða ótolandi.

**Kann ikki forsvarast**

Ein samgonga kann leggja ætlanir og gera politiskar raðfestingar. Men, at lata stovnar aftur og siga fólki upp, uttan at seta nakað ístaðin er beinleiðis óforsvarligt.

Vit hugsa um mong, ið eru send í útlegd, tí vit ikki kundu hýsa teimum og geva teimum, tað teimum tørvaði. Tað sum hendir nú, ber boð um ódugnaskap, og tú kanst ikki lata vera við at hugsa, at sum er hava børnini tað kanska frægari, sum koma á stovn uttanlands við tryggum og føstum karmum og innihaldi - heldur enn tað, ið verður bjóðað teimum her.

Hjartaskerandi, tí vit hava vælútbúgvin og dugnalig starvsfólk í Føroyum. Vit áttu heldur at savna servitanina, enn at lati hana fara fyri skeyti. Flestu børnini, tey ungu og avvarðandi teirra, vildu uttan iva eisini fegnast verið her.

Komandi mikudag eru munnligir fyrispurningar á skrá í tinginum. Landsstýriskvinnan skal tá svara fyrispurningum um framtíðina hjá teim ungu, handfaringina í samband við uppsagnirnar, umframt á hvønn hátt veruleikin samsvarar við samgonguskjalið.

Staðfestast má, at sum er, er ógjørligt hjá Slóðini at slóða fyri teim ungu.

**Sosialurin**

**Sosialurin**
Stovnaður: 1927
**Ábyrgdarblaðstjóri:** Jan Müller jan@sosialurin.fo
**Blaðstjóri:** Eirikur Lindenskov eirikur@sosialurin.fo

**Marknaðardeild:** lysing@sosialurin.fo
**Marknaðarleiðari:** Finnbjørg Nattestad finnbjorg@sosialurin.fo
Høgni Thomsen hogni@sosialurin.fo
Elin Vatnhamar Olsen evo@sosialurin.fo
Svein Rógvi Nielsen Ljósstein sveinrogvi@sosialurin.fo

**Blaðfólk:**
Áki Bertholdsen aki@sosialurin.fo
Vilmund Jacobsen vilmund@sosialurin.fo
Inna Törnroos inna@sosialurin.fo
Magnus Gunnarsson maggi@sosialurin.fo
Rigmor Dam rigmor@sosialurin.fo
Leo Poulsen leo@sosialurin.fo
Eyðun Klakstein eydun@sosialurin.fo
Árni Joensen arni@sosialurin.fo
Anna V. Ellingsgaard anna@sosialurin.fo
Rógvi Nybo rogvi@sosialurin.fo
Eirikur í Jákupsstovu eij@sosialurin.fo

**Ítróttur:**
Jákup Mørk jakup@sosialurin.fo

**Myndamenn:**
Álvur Haraldsen alvur@sosialurin.fo
Jens Kristian Vang jensk@sosialurin.fo

**Kykmyndir:**
Alvin Elleby Andersen alvin@ras2.fo

**Sosialurin í Norðoyggjum:**
Nólsoyar Pálsgøta 1, 700 Klaksvík
tel. 458686 fax 458687
e-post: klaksvik@sosialurin.fo

**Sosialurin í Suðuroy:**
tel. 375364 fax 375464
tel. 228814
e-post: aki@sosialurin.fo
e-post: dagfinn@sosialurin.fo

**!!! Haldarar**
sum ikki hava fingið blaðið, kunnu ringja til 341818 frá kl. 8.00-20.00 og boða frá

**Uppseting/prent:**
Uppseting: Sosialurin
Prent: Prentmiðstøðin
**Útgevari:**
Sp/f Sosialurin
**Avgreiðsla:**
Mán.-frí. 8-16
Tórsgøta 1, 100 Tórshavn
Tel. 341800, Fax 341801
**Postadressa:**
Postboks 76, 110 Tórshavn
**E-mail:**
post@sosialurin.fo
lysing@sosialurin.fo
lysingartorg@sosialurin.fo
varp@sosialurin.fo

Blaðið verður prentað mánadag-fríggjadag klokkan 13[30]

**Lýsingar**

| Freistir: | Tekstlýsingar | Størri lýsingar | Lýsingartorgið | Heilsanir |
|---|---|---|---|---|
| Mánadagsblaðið | Mán.kl. 10 | Frí. kl. 15 | Frí. kl. 12 | Frí. kl. 12 |
| Týsdagsblaðið | Týs. kl. 10 | Mán. kl. 15 | Mán. kl. 12 | Mán. kl. 12 |
| Mikudagsblaðið | Mik. kl. 10 | Týs. kl. 15 | Týs. kl. 12 | Týs. kl. 12 |
| Hósdagsblaðið | Hós. kl. 10 | Mik. kl. 15 | Mik. kl. 12 | Mik. kl. 12 |
| Fríggjadagsblaðið | Frí. kl. 09 | Hós. kl. 15 | Hós. kl. 12 | Hós. kl. 12 |

Størri lýsingar, sum nógv arbeiði stendst av, mugu vera inni í góðari tíð og áðrenn ásettu freistir.
Framíhjápláss má umbiðjast í góðari tíð.

**Stødd:**
Ein heil síða í Sosialinum er 254 mm breið og 346 mm í hædd. Breiddin á einum teigi er 39 mm og rúmið millum teigarnar er 4 mm.

**Innsent tilfar**
Fult navn skal vera undir innsendum tilfari. Innsendar greinar, har blaðleiðslan ikki er kunnað um bústað og telefonnummar, verða ikki settar í blaðið.